LM-067/2020

Løgtingsskrivstovan
Postboks 208
FO-110 Tórshavn
Att.: Fíggjarnevndin

Tórshavn, 20. januar 2021

Hoyringsskriv

viðvíkjandi

uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjøld av skráseting av motorakførum

(Lækka virðisavgjaldið fyri persónbilar við hybrid tøkni og persónbilar við plugin-hybrid tøkni, rokna skrásetingargjaldið á innfluttum brúktum motorakførum við støði í keypsprísinum, frítaka flytigóðsmotorakfør frá skrásetingargjaldi, stytta tíðarskeiðið fyri undantøku av virðisavgjaldi hjá hýru- og skúlavognum og leingja undantøkuna fyri at rinda virðisavgjald fyri motorakfør, sum bara nýta ravmagn ella vetni til framdrift)

og

uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin)

(Leingja heimildina at fáa meirvirðisgjald endurrindað í sambandi við bygging ella umbygging av ávísum leigubústøðum, keyp av ávíkavist orkuvinarligum motorakførum og elriknum hitapumpuskipanum og dagføring av reglunum um leigubilar)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur lagt tvey broytingaruppskot í Løgtingið, løgtingsmál nr. 66 og nr. 67. Vit hava valt at viðgera hesi bæði broytingaruppskotini sum ein samlaðan pakka.

Bilasølurnar Reyni Service, Nordbil, Nordcar, Bilrøkt, Auto Service, Berg Motors og Wenzel hava set saman hetta hoyringsskriv til bæði broytingaruppskotini. Nevndu bilasølur eru samdar í øllum niðurstøðunum í hesum hoyringsskrivi.

Fyrst er at siga, at bilsølurnar gleðast um, at broytingaruppskot er lagt fram um skrásetingaravgjøld av motorakførum og meirvirðisgjaldslógina. Broytingaruppskotini stuðla undir, at motorakfør á føroysku vegunum vera "grønari". Í samgonguskjalinum stendur at, "Samgongan vil seta í verk átøk, sum minka um útlát og dálking. Eisini vil samgongan virka fyri at verja okkara viðbreknu náttúru og umhvørvi." Bilasølurnar halda avgjørt, at broytingaruppskotini eru ítøkiligt stig á leiðini at minka um útlat og dálking. Uppskotið stuðlar undir, at allir føroyskir bileigarar fáa møguleikan at velja meiri umhvørvisvinarligari motorakfør.

1. Lækka virðisavgjaldið fyri persónbilar við hybrid tøkni og persónbilar við plugin-hybrid tøkni

Endamálið við broytingaruppskotinum er flyta motorakførini í Føroyum yvir í meira grøna tøkni. Allir bilaframleiðarar arbeiða við ymiskari tøkni, og allar hesar hava minni útlát enn traditionella bensin- og diesel tøknin.

Við verandi avgjøldum eru bilarnir við nýggju tøknini dýrari enn bensin og diesel bilarnir og tískil ikki kappingarførir. Fjøldin av føroysku bileigaranum fáa við hesum broytingunum lættari atgongd til at velja eina umhvørvisvinarligari billoysn enn áður.

Tað er ein tilgongd at fáa flutt føroysku bilparkina yvir í meira umhvørvisvinaliga tøkni. Tað kann vera eitt langt lop frá at koyra í kendu bensin og diesel bilunum yvir í ein el- ella vetnisdrivnan bil. Fólk, sum sita í hesari tvístøðu, fáa við hesum uppskoti lættari atgongd til millumloysnina, sum er hybrid ella plug-in hybrid, og á tann hátt verður føroyski bileigarin fluttur stigvíst yvir í grønari og orkuvinarligari tøkni. Broytingaruppskotið tekur hædd fyri hesum, tí øll grønari tøkni á ein ella annan hátt verður bíligari.

Bilarnir, sum vera skrásettir í Føroyum, skulu fylgja umhvørviskrøvunum frá ES. Øll umhvørviskrøvini flyta bilaframleiðarar til at framleiða meira umhvørvisvinarligar bilar. Sum úrslit av hesum, hava føroysku bilasølurnar í størri mun møguleika at fáa fatur á bilum, sum eru bygdir á hybrid, plug-in hybrid, el- ella vetni tøkni, og í minni mun á bilum, sum eru bygdir á siðbundna tøkni (bensin og diesel). Kósin, sum broytingarnar í umhvørviskrøvunum viðføra, eru ikki sæddar í sama mun í avgjøldunum í sambandi við skráseting av motorakførum. Tí er at gleðast um, at hædd verður tikið fyri hesum í broytingaruppskotinum, soleiðis at virðisgjaldið verður dagført í tráð við nýggja veruleikan.

Nevndu bilasølur taka undir uppskotinum.

Tað skal eisini havast í huga, at hetta kemur at ávirka søluna av teimum bilum, sum standa á goymslu. Tí skjóta vit upp, at bilarnir, sum eru á goymslu, og sum blíva ávirkaðir av hesi lógarbroyging, sleppa undir somu treytir sum hybrid bilarnir.

2. Rokna skrásetingargjaldið á innfluttum brúktum motorakførum við støði í keypsprísinum

Endamálið við uppskotinum er at gera innkrevjingina av skrásetingargjøldunum lættari at umsita. Akstovan brúkar í løtuni nógv orku til at umsita hetta økið.

Bilasølurnar vóru á einum máli um, at tað ikki er ein skilagóð loysn, at fara frá at brúka upprunavirðið og yvir til at brúka útveganarvirði, keypsfakturan. Bilasølurnar mettu, at tað hevði verið ein betri loysn, um Akstovan fekk í lag eitt samstarv við uttanveltaðan stovn, eitt nú Motorstyrelsen í Danmark.

Vit hava áður havt mál her á landi, har falsaðir fakturar vórðu nýttir sum grundarlag undir innflutningi, og vandin fyri slíkum málum verður øktur munandi, verður uppskotið samtykt.

3. Frítaka flytigóðsmotorakfør frá skrásetingargjaldi

Vit skilja væl broytingarnar, tá talan er um ein eldri flytigóðsmotorakfør, sum fólk hava átt í nøkur ár uttanlands. Í teimum førunum kann ásetingin um virðisavgjald virka tyngjandi, og tí er flytingin av eldri bili til Føroya kostnaðarmikil.

Broytingaruppskotið leggur upp til, at øll flytigóðsmotorakfør verða undantkið virðisavgjaldi.

Bilasølurnar vóru á einum máli um, at ein tílík broyting fór at lata upp fyri spekulatión. Virðisavgjaldið verður afturgoldið í fráflytandi landinum og tí verður møguleikin at innflyta motorakfør uttan virðisgjald latin upp. Hetta meina bilasølurnar ikki er rætt. Í viðmerkinginum verður sagt, at talan er um fá akfør, men um møguleikin at innflyta flytigóðsmotorakfør frítt fyri virðisavgjøldum, kann hetta tal lættlig hækka munandi.

4. Leingja undantøkuna fyri at rinda virðisavgjald fyri motorakfør, sum bara nýta ravmagn ella vetni til framdrift og áseta framtíðar virðisavgjald fyri hesi akfør

Bilasølurnar taka undir við broytingaruppskotinum, við grundgevingini at hesi akfør eru sera kostnaðarmikil. Væntast kann, at kostnaðurin á hesari tøkni fer at lækka í framtíðini og tí er tað skilagott at innseta eitt framtíðar virðisavgjald fyri hesi akfør. Tó skal sigast, at bilasølurnar mettu, at ásetingin av framtíðar virðisavgjaldinum kundi verið meira líðandi og yvir eitt longri tíðaskeið. Ivasamt er, um kostnaðurin av hesari tøkni fer at lækkað munandi innan eitt tvey til trý ára tíðarskeið.

Víst verður annars til grundgevingarnar undir punkt 1, har hendan broyting stuðlar undir at flyta føroyska bileigaran yvir í meira grøna tøkni.

5. Endurrindan av meirvirðisgjald í sambandi við keyp av orkuvinarligum motorakførum (el-, vetnis- og plug-in hybrid akførum)

Við somu grundgeving sum undir punkt 1. og 4 taka allar bilasølurnar undir við broytingaruppskotinum.

6. Dagføra reglurnar um leigubilar

Yvirskipa eru allar bilasølurnar samdar um, at tað var ein skilgóð loysn at áseta greiðar reglur um leigubilar fyri uml. 2 árum síðani. Tó ynskja bilasølurnar at vísa á, at reglurnar um leigubilar liggja skilabetri í kunngerð, heldur enn løgtingslóg. Eitt gott dømi um hetta, er Korona støðan í 2020. Staðfestast kann, at leigubilarnir hava sera torført við at uppfylla kravið um 12.500 kilometrar 2020, tí ferðavinnan nærum hvarv og eftirspurningurin eftir leigubilunum fall nærum burtur. Um reglurnar vóru í kunngerð, hevði landsstýrismaðurin havt heimild at broytt t.d. kilometrarnar samsvarandi nýggju støðuni.

Bilsølurnar meta eisini at undir vanligum umstøðum er krav um 12.500 kilometrar ov høgt. Broytingaruppskotið leggur upp til, at kilometurtalið lækkar til 10.000 kilometrar. Ein sannroynd er, at við nýggja Eysturoyartunnilinum er vegakervið í Føroyum minkað og kilometurtalið sum ein meðal leigubilur koyrir minkar tilsvarandi. Bilsølurnar meta, at eitt meira hóskandi kilometurtal kundi verið 7.000 kilometrar.

Harumframt leggur broytingaruppskotið upp til at strikað ásetingina í MVG-lógini § 10, stk. 2, 2 pkt. "*Við sølu av leiguakfari kann frádrátturin í mesta lagi vera 45.000 kr. í útgangandi avgjaldinum fyri hvørt leiguakfar.*" Grundgevingin undir broytingini er, at tað er sera torført við verandi áseting, at nøkta tørvin hjá tí "kræsna" bilaleigaranum. Bilasølurnar mæla frá at strika ásetingina í MVG-lógini § 10, stk. 2, 2 pkt., men mæla heldur til, at markið verður broytt frá 45.000 kr. til 60.000 kr. Ein tílík hækking av markinum viðførir at nógv tann størsti parturin av leigubilaparkini í Føroyum er dekkaður av ásetingini.

Vinarliga

Auto Service, Pól Jákup Poulsen

Berg Motors, Saroya Dalsgarð

Bilrøkt, Jákup á Borg

Nordbil, Birgir Dam Jacobsen

Nordcar, Palli Skorheim

Reyni Service, Sámal av Reyni

Wenzel, Rúni Djurhuus